VESTMANNA KOMMUNA

## GJÁARLON SØKIR EFTIR NÁMSFRØÐINGI, AVLOYSARA OG KØKSHJÁLP

Søkt verður eftir námsfrøðingi, tímaløntum avloysara og køkshjálp til dagstovnin Gjáarlon í Vestmanna at byrja 1. februar 2008 ella sum skjótast.

**Vit sóknast eftir**
- 1 námsfrøðingi 30 tímar um vikuna. Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í staðin.
- 1 tímaløntum avloysara
- 1 køkshjálp 20 tímar um vikuna.

Dagstovnurin er í 5 eindum við vøggustovu og barnagarði – skipaður til íalt 84 børn.

Stovnurin letur upp kl. 7:15 og letur aftur kl. 17:15.

Gjáarlon er ein grønur stovnur, sum leggur dent á at fara væl um umhvørvið inni sum úti.

Umstøðurnar eru sera góðar bæði innan– og uttandura.

**Vit bjóða**
Í tí dagliga arbeiðinum leggja vit stóran dent á trivnaðin hjá børnum og starvsfólkum, og vit virka alsamt fyri at skapa álit og tryggleika fyri børn og foreldur. Gerðandisdagurin er somuleiðis merktur av, at vit eru ein grønur stovnur.

**Vit ynskja**
Vit leggja dent á, at tú hevur førleika at arbeiða sjálvstøðugt, ert ágrýtin og nýhugsandi. Tú tekur ábyrgd og virkar í góðum samstarvi við samstarvsfelagar og foreldur, og saman við okkum ert tú við til at menna tað námsfrøðiliga arbeiðið. Vit vænta, at tú sært møguleikar og avbjóðingar fram um forðingar.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanarviðurskifti eru skipað sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Køkshjálp**
Vit vænta at tú ert fyrikomandi og fryntlig/ur, og eisini at tú tolir at verða órógvað/ur av børnum.

3 teir fyrstu mánaðarnir verða roknaðir sum royndartíð.

Vit tilskilja okkum rætt til ongan at seta.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanarviðurskifti hjá køkshjálpini eru skipað sambært sáttmálanum ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Morið A. O. Gardy, leiðara, á telefon 230134 ella Solveig Olsen, varaleiðara, á telefon 230154.

**Umsókn og freist**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 22. januar 2008, kl 12:00.

Setanarsamrøður verða í viku 4.

Send eina umsókn við avriti av prógvum og viðmælum til:

Gjáarlon
Hornavegur 16
FO – 350 Vestmanna

Umsóknir skulu merkjast »Gjáarlon«.

**DAGSTOVNURIN GJÁARLON**

SUNDA KOMMUNA

## Pedagogar til Dagstovnin á Flatinum

**Vit søkja eftir:**
- 1 pedagogi umleið 30t um vikuna til vøggustovuna Ennið
- 1 pedagogi 25 t um vikuna til frítíðarskúlan at byrja 1 februar ella eftir nærri avtalu.

**Í okkara arbeiði leggja vit dent á:**
***Virðing-tryggleika-umsorgan-ymiskleika og nærveru***

**Er hetta nakað fyri teg, hevði tað glett okkum at frætt frá tær.**

**Setanarviðurskifti:**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið á lønarstigi 11 – 18.

Um ongin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað.

**Meira fæst at vita** við at ringja til Rosu Prestá leiðara á tlf 471030/771030 ella Sólrún Dam varaleiðara á tlf 471034

**Umsókn** við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 17 januar 08 og sendast til:

Dagstovnurin á Flatinum
Skúlavegur 9
400 Oyrarbakka

ella við telduposti til: dagstoyr@post.olivant.fo

**Um stovnin:**
Vit eru 88 børn í aldrinum 0 – 10 ár og 23 starvsfólk. Opið er frá 7.15- 17.15. Stovnurin er skipaður í 2 vøggustovur, 2 barnagarðsstovur og 1 frítíðarstova . Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar bæði innan og uttandura, hvør barnastova er ein sjálvstøðug vælútgjørd eind, umfram eitt stórt felagsrúm, viðtaluhølið, serstova og ymisk verkstøð. Økið uttanfyri er stórt við nógvum møguleikum, og stovnurin liggur sera væl fyri t.d. beint við haga og fjøru, við skúla, fimleikarahøll, svimjihøll og góðum busssambandi.

TVØROYRAR KOMMUNA

## Dagrøktin í Tvøroyrar kommunu

Søkt verður eftir dagrøktarum til ansing av børnum frá 0 – 3 ár

**Vit vænta av tær:**
- At tú hevur góðar umstøður, at hava børn, bæði inni og uttanfyri.
- At tú tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- At tú vísir viðring fyri børnunum,foreldrum og starvsfeløgum.
- At tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir.
- At tú ert tolin og vísir umsorgan.
- At tú hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- At tú dugir at sýggja møguleikar í staðin fyri forðingar.
- At tú hevur roykfrítt og viðkvæmisvinarligt heim.

Í dagrøktarskipanini starvast 16 dagrøktarar og ein leiðari.

Talið av børnum í dagrøktini eru 64.

Ein fastan dag um vikuna eru 3 dagrøktarar saman við børnunum í spælistovuni.

Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 – 17.15.

Vit kunnu bjóða tær starv í góðum og tryggum arbeiðsumstøðum, við góðum og álítandi samstarvsfeløgum

Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til dagrøktarleiðaran í Tvøroyrar kommunu á tlf. 211339 og tosa við dagrøktarleiðaran Súsannu Poulsen

**Umsóknarfreist:**
18. januar 2008, kl.16.00

Vinarliga send umsókn tygara til:

**TVØROYRAR KOMMUNU**
**Dagrøktarskipanin**
**800 Tvøroyri**

## Skattalistin fyri 2006

Skattalistin 2006 fyri Tórshavnar kommunu liggur frammi til alment innlit frá týsdegnum 8. januar til fríggjadagin 18. januar 2008, báðar dagar íroknaðir.

Listin liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum allar gerandisdagar frá kl. 9.00 til 16.00, tó hósdag til kl. 18.00.

**Tórshavnar kommuna**

## Skattalistin

fyri árið 2006 liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð **frá týsdegnum 08. januar 2008 til og við mánadagin 21. januar 2008**

**Sørvágs Kommuna**
www.sorvag.fo

VARÐAGØTA 8 · FO-380 SØRVÁGUR
SORVAG@SORVAG.FO · TEL 332004